Tiðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

Veðrið

Fimmdagaforsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Strúkur í vindi upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Um kvøldið hækkar hann upp í vestan og útnyrðing og minni vindur. Ælingur og hitin millum 13 og 16 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men móti kvøldi veksur hann vindin av útsynningi og regn. Hitin millum 13 og 16 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum driv ella mjørki, tó kann sólin koma fram í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig, men har mjørki er um 12 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri, men sunnudagin minni vindur. Sirm ella mjørki av og á og hitin millum 11 og 15 stig.

Grind í Hvannasundi

Mánakvøldið legði ein grind á 63 hval beinini í Hvannasundi

JOHN JOHANNESSEN

Hvannasund: Klokkan níggju mánakvødlið løgdu 63 hval beinini í Hvannasundi.

Grindin varð funnin klokkan hálvgum fimm seinnapartin 5 fjóðringar suður úr Svínoynni.

Teir 63 hvalirnir taldu 595 skinn. Seðlarnir komu út klokkan seks týsmorgunin, og varð grindin býtt til hvørt mansbarn í bygdunum eystan fyri Múla. Harafturat varð grindin eisini býtt í bátspartar og partar til grindamenninar á landi.

Teppi úr mannahárum

Tita Vinther úr Havn hevur gjørt eitt teppi bara úr menniskjahárum, og tað hongur nú sum veggjaprýði í salongini hjá Tótu

STEFAN Í SKORINI

Í eitt hálvt ár hava tær í salongini hjá Tótu savnað saman hár, sum Tita Vinther hevur nýtt til at gera hetta teppið. Úrslitið prýðir nú veggin í salongini hjá Tótu, har tær hava stóra gleði av tí.

Hetta er ikki tað fyrsta teppið úr menniskjahárum, sum Tita hevur latið úr hondum. Eitt hongur í Klaksvík og so hetta hjá Tótu. Eisini hevur Tita gjørt eina stóra nót úr menniskjahárum, sum er eini fimm metrar til longdar. Henda nótin hevur eisini verið á várframsýningini.

Tita hevur eisini arbeitt við hestahárum, sum verður tikið av halanum á hesti. Tita sigur, at menniskjahár er nógv fínari enn hestahár, sum annars er sera gott tilfar at arbeiða við.

2,5 kilo av hári

Til teppið nýtti Tita 2,5 kilo av hári, sum tær hjá Tótu hava brúkt eitt hálvt ár um at savna saman. Heilt fitt av svinni er, tá arbeitt verður við hári, so teppið vigar nú eini tvey kilo. Ikki alt hár kann nýtast, tí tað skal hava eina ávísa longd, og liturin skal ikki vera ein og hvør.

Tita hevur fyrst spunnið hárið og síðani vovið tað til eitt teppi. Tita hevur tó ikki hoyrt um nakran annan, sum hevur spunnið hárið, so kanska er hon tann fyrsta á tí økinum.

Tað at nýta menniskjahár er ikki nakað nýtt, men tað hevur verið brúkt í øldir. Fornminnissavnið hevur eina urketu úr menniskjahárum liggjandi, so Tita er ikki tann fyrsta, men hár er eisini sera slitsterkt.



Lágtrýstið yvir Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin. Lágtrýstið sunnanfyri Hvarvið fer móti Íslandi.



Lágtrýstið við Ísland fer í landnyrðing og lýggj og slavin luft rekur móti Føroyum av útsynningi.



Hitalagið mált frá 21./08. kl 06⁰⁰–22./08. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,8°C
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**



Avfallið: <0,1 mm – **mált frá 21./08. kl 6⁰⁰–22./08. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í august: 53,9 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	6
Qaqortoq	11
Ammassalik	9
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	10
Lerwick	10
Aberdeen	13
London	20
Tromsø	10
Bergen	13
Oslo	–
Stokkhólm	17
Keypmannahavn	18
Helsinki	17
Moskva	21
Berlin	20
Warzawa	26
Kiev	33
Bukarest	34
Paris	20
Madrid	25
Róm	31
Malorca	30
Athen	33
Malta	36
Tunis	38
Beijing	23
New Dehli	30
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	20
New York	22
Miami	29
Los Angeles	23
Meksikobýur	19
Panama	–
La Paz	10
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	16

Vestfalskyrrindi

22. aug.: Seinna kvarter
27. aug.: Mánin næstur jørðini
29. aug.: Tendring

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	sp	Vestmannasundi fp	sp	Mykinesfirði fp	sp	Nólsoyarfirði fp	sp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp	sp	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp	sp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp	sp	Hvannasundi fp	sp	Fugloyarfirði fp	sp
23. aug.	00.08	12.41	11.41	–	11.56	–	02.08	14.41	03.08	15.41	10.56	23.39	09.56	22.39	00.23	12.56	01.23	13.56	–	12.26	01.08	13.41
24. aug.	01.24	14.12	00.24	13.12	00.39	13.27	03.24	16.12	04.24	17.12	–	12.27	11.27	–	01.39	14.27	02.39	15.27	01.09	13.57	02.24	15.12
25. aug.	03.04	15.54	02.04	14.54	02.19	15.09	05.04	17.54	06.04	18.54	01.19	14.09	00.19	13.09	03.19	16.09	04.19	17.09	02.49	15.39	04.04	16.54
26. aug.	04.38	17.15	03.38	16.15	03.53	16.30	06.38	19.15	07.38	20.15	02.53	15.30	01.53	14.30	04.53	17.30	05.53	18.30	04.23	17.00	05.38	18.15

Kelda: Skipalistin 2000